# SERSTØK

BYGGISAMTYKT

FYRI

MIÐVÁGS KOMMUNU

## INNIHALDSYVIRLIT

BROYTAN AV BYGGISAMTYKTINI, TIL SERSTAKA BYGGISAMTYKT FYRI EITT NATÚRLIGA AVMARKAÐ ØKI. MIÐSTAÐARØKI, INNI Á BAKKA Í MIÐVÁGI TIL MIÐSTAÐARENDAMÁL.

**Ásetingar fyri øki A1: MIÐSTAÐARENDAMÁL**

1. Økið verður lagt av til blandaða búðstaðar- og miðstaðarbygging. Miðstaðarbygging má einans vera hús, sum heilt ella lutvís vera innrætta til matsstovur, handlar, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhølir og tílíkt. Loyvt er at innrætta íbúðir í økinum.

2. Byggistigið á nýggjari bygging má ikki fara upp um 0,6. Byggistigið fyri samlaða økið má ikki fara upp um 0,65.

3. Nýtingarstigið fyri samlaða økið má ikki fara upp um 1,3.

4. Húsini fram við Jantavegi kunnu í mesta lagið verða bygd í 2 hæddum, og skulu ikki vera hægri enn 6 m til yvirgrindina frá hovuðsvegi, og 7,0 m til mønu.

5. Onnur hús á økinum, millum niðara veg og fjøruna, kunnu í mesta lagi vera bygt í 2 hæddum. Mest loyvda hædd til yvirgrind frá vegi er 7,0 m og 10,0 m til mønu.

6. Kjallari verður roknaður uppí sum húsahædd um so er, at loftið er meira enn 1,0 m yvir hægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallarahædd er loyvd. Kjallarin verður ikki roknaður uppí byggistig og nýtingarstig.

7. Nýbygging: Tá nýbygging fer fram, skulu framsløir móti Jatnavegi, ikki koma nærri vegi/gongubreyt enn 5,5m.

8. Viðløgd skitsa/tekning vísir dømir av skurði hvussu pkt. 7 er hugsað.

**Ásetingar fyri F1 økini: Frílendi.**

a) Frílendi, t.e. lendi, sum ikki má byggjast á. Lutvíst eru tað lendi, sum løgd eru av til varveitan av náttúru og forminnum o.t.

**2. gr. Samtyktar- og góðkenningarátekning.**

Soleiðis samtykt av Miðvágs Bygdaráð

Miðvágs Kommuna, Miðvági hin 20 / 3 2007.

Napoleon Magnussen, borgarstj.

Georg Hansen, skr.

Sambært gr. 4, stk. 1. í løgtingslógini um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954 við seinni broytingum, góðkennir Innlendismálaráðið frammanfyristandandi av Miðvágs bygdaráð samtykta uppskot til serstaka byggisamtykt fyri Miðvágs Kommunu.

Føroya Landsstýri ____ / ____ 2008.

| INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 1836 - 006 / 07 |
| Góðkent: | 4/10 - 07 |
| Dagfesting: | 7/2 - 08 |
| Váttað: | [signature] |

MIÐVÁGS KOMMUNA. SERSTØK BYGGISAMTYKT INNI Á BAKKA




A
A
F
A1
A1
F1
G
Serstøk byggisamtykt


A
A1
F1
Miðvágur
Serstøk bygglsamtykt
fyri A1 og F1 økið